# Stýrisfundarbók FKF

## 08-02-2011 / 2

*Fundarstað:* Hotel Hafnia

*Fundur byrjar kl:* 13:00

*Fundur lokin kl:* 16:46

| Stýrislimir | Viðmerking |
|---|---|
| Karl A. Olsen | |
| Johan Christiansen | |
| Erik Davidsen | |
| Hans Jákup Kallsberg | |
| Delmar Tausen | |
| Dánjal Jákup Jakobsen | |
| Albert Ó. Ellefsen | |
| Jógvan K. Mørkøre, varaform. | |
| Asbjørn Djurhuus form. | |

**Fundarmál nr: 6**

FKF Jour. nr: 09-131

Reist av: Fíggjarmálamálaráðnum

Fundarmál: Kommunustýrislógin, broyting í álíkning

Málslýsing: Málið hevði viðmerkingarfreist til 31-01-2011 og er viðgjørt í FK-bólkinum. Hoyringssvar er sent FMR. Sí skjal nr. 6.

Bólkurin greiðir frá.

Fundarsamtykt: Viðmerkingar frá bólkinum viðtiknar.

*Støða: Avgreitt við skrivi merkt 09-131_1.3 til FMR 31. januar.*

---

**Fundarmál nr: 7**

FKF Jour. nr: 09-132

Reist av: Innlendismálaráðnum

Fundarmál: Bygging, lógaruppskot

Málslýsing: IMR hevur 17-01-2011 sent felagnum Uppskot til løgtingslóg um bygging av bygningum o.a. ( Byggilógin ) til hoyringar. Sí skjal nr. 7.

Lógin hevur fyrr verið til hoyringar, m.a. Hjá felagnum, fyri ári síðani. Tá legði felagið m.a. Dent á, at kommunurnar, sum byggimyndugleiki, eiga at útskriva byggiloyvir og hava eftirlit við byggingini.

Høvuðsbroytingarnar í mun til fyrra lógaruppskotið eru:
- Niðurtøka av bygningum er tikið við
- Byggiloyvið krevst til allar byggingar, eisini smávegis broytingar
- Eftirlitsuppgávan er løgd til kommununa,
- Byggningseftirlitið kann einans fremjast við sýning
- Uppskoti ger skilnað millum hvat verður regulerað av ávikavist núverandi býarskipanarlóg og nýggju byggilógini.

Uppskotið er eisini sent kommununum til ummælis.

Fundarsamtykt: Viðmerkingar til:
§4. kommunan kann, við loyvi lsm, í ávísum førum loyva frávik frá lógini. Tvørlig og ógreið mannagongd.
§7, um tíðarásetingin til bygging og endurnýggjan ella longing av loyvi sum er fallin fyri tíðarfreistini.
§8, um manglandi byggisamtyktir. Bygdir og øki uttan byggisamtyktir?

*Støða: Avgreitt við skrivi merkt 09-132_1.3 til IMR 10. februar.*

**Fundarmál nr: 8**

FKF Jour. nr: 09-133

Reist av: Innlendisráðnum

Fundarmál: Havumhvørvi, lógarbroyting

Málslýsing: Í skrivi dagf. 17. januar bjóðar Innlendismálaráðið felagnum at viðmerkja broytingaruppskot til Havumhvørvislógina. Sí skjal nr 8.

Endamálið við lógaruppskotinum er at røkka málið hjá sitandi samgongu um at herða revsingina fyri oljudálking. Oljudálking á sjónum hevur negativ árin á vistfrøðiligu ringrásina og er ein støðug hóttan móti okkara týðandi náttúru- og fiskatilfeingi. Eitt tilfeingi, sum hevur alstóran fíggjarligan og búskaparligan týdning fyri Føroyar.

Fundarsamtykt: Ongar viðmerkingar.

*Støða: Avgreitt við skrivi merkt 09-133_1.2 til IMR 9. februar.*

**Fundarmál nr: 9**

FKF Jour. nr: 09-85

Reist av: Mentamálaráðnum

Fundarmál: Dagstovnar, lógarbroyting

Málslýsing: Í telduposti dagf. 3. februar bjóðar Mentamálaráðið felagnum at viðmerkja uppskot til lógarbroyting í §8 í dagstovnalógini. Sí skjal 9.

Samb. uppskotinum, kan lsm kann eftir nærri ásettum reglum, eftir umsókn frá kommunu loyva, at dagstovnur og dagrøkt hava felags leiðslu.

Sligið verður fast, at ein stovnur skal hava ein leiðara, eins og ein dagrøkt skal hava ein leiðara. Í viðmerkingunum verður eisin lagt tímatal fyri dagrøktarleiðaran eftir tali av børnum.

Uppskotið er eisini sent KSF, KAF, Almannaráðnum, Føroya pedagogfelag, Føroya arbeiðarafelag og Starvsmannafelagnum til hoyringar.

Fundarsamtykt: Senda lsm skriv um felags leiðsluloysn fyri dagstovnarnar.

*Støða: Avgreitt við skrivi merkt 09-085_7.2 til MMR 9. februar.*

**Fundarmál nr: 10**

FKF Jour. nr: 09-065

Reist av: Skrivstovuni

Fundarmál: Roknskapur FKF 2010

Málslýsing: Grannskoðaðir roknskapir felagsins og Agenda 21 stovunnar til góðkenningar og undirskriftar.
Roknskapurin er ikki tøkur enn, men útskrift úr bókhaldinum er at síggja í skjali 10.

Fundarsamtykt: Roknskapur FKF við grannskoðaraprotokoll og roknskapurin fyri Agenda 21 verkætlanina undirskrivað.

*Støða: Avgreitt.*

**Fundarmál nr: 11**

FKF Jour. nr: 09-097

Reist av: Innlendismálaráðnum

Fundarmál: Kommunubygnaðurin, uppskot til reform

Málslýsing: Í skrivi dagfest 1. februar, heitir llandsstýrismaðurin í kommunumálum á felagið, at viðgera spurningin um fólksliga tilgongd í samband við ætlaða kommunala umskipan, har Føroyar verða skipaðar í 9 kommunur. Sí skjal 11.

Fundarsamtykt: Stýrið tekur undir við leistinum um fíggjarligi parturin er útgreinaður og semja er um hann.

Semja um
- 9 samstarvsøki. Jógvan K. Mørkøre ímóti. Hann heldur at kommunurnar skulu finna útav tí sjálvar.
- Fortreytirnar mugu vera kendar innan møguliga fólkaatkvøðu. Um atkvøðan sigir nei, so er tað nei.

*Støða: Avgreitt við skrivi 09-097_3.2, dagf. 21. februar, til IMR.*

**Fundarmál nr: 12**

FKF Jour. nr: 09-135

Reist av: Fíggjarmálaráðið

Fundarmál: Tinglýsingargjøld

Málslýsing: FMR hevur 24-01-2011 sent felagnum Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tinglýsingargjøld. Sí skjal 12.

Broytingin gevur Umhvørvisstovuni heimild at taka gjald fyri tinglýsingar og fyrispurningum hesum viðvíkjandi. Sum er, er hettar ókeypis fyri brúkaran.

Fundarsamtykt: Heita á Ism um at upplýsa hvat gjaldið er grundað á.
Feilur í viðmerkingunum viðvíkjandi fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar.
Vísa á, at upplýsingarnir eru bert at heinta hjá Tinglýsingini.

*Støða: Avgreitt við skrivi merkt 09-131_1.3 til FMR 31. januar.*

**Fundarmál nr: 13**

FKF Jour. nr: 09-134

Reist av: Fíggjarmálaráðnum

Fundarmál: Manntal, lógaruppskot

Málslýsing: í telduposti dagf. 31. januar, bjóðar Fíggjarmálaráðið felagnum at viðmerkja uppskot til lóg um manntal í 2011. Sí skjal 13.

Fundarsamtykt: Ongar viðmerkingar.

*Støða: Avgreitt við skrivi merkt 09-134_1.2 til FMR 9. februar.*

**Fundarmál nr: 14**

FKF Jour. nr: 09-085

Reist av: Mentamálaráðnum

Fundarmál: Dagstovnalógin, endurskoðanarbólkur

Málslýsing: Samb. áheitan frá felagnum, biður MMR í telduposti 7. februar, um navn á einum umboði aftrat í bólkin.

Karl Olsen er longu limur í bólkinum, og Erik Davidsen hansara varamaður.

Fundarsamtykt: Albert Ellefsen annar limur.

*Støða: Avgreitt við telduposti til MMR 8. februar.*